

*Ælabogin fyllir í ár tíggju ár, og so frægt Annika Højgaard visti, skuldi hon bert í føðingardag*

# Annika fekk ársins herðaklapp

**Seinnapartin í gjár lat Javni ársins herða klapp. Hetta hava tey gjørt seinastu fimm árini og hesaferð fekk Annika Højgaard tað**

HERÐAKLAPP
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

»Og okkum dámar tað, og okkum dámar tað.« Soleiðis sang og spældi ælabogin eftir at orkesturstovnarin og dirigenturin, Annika Højgaard, hevði fingið ársins herðaklapp 2008.

Sjálv var Annika Højgaard ovfarin av heiðrinum.

- Eg eri málleys, eg haldi vit fara at siga takk aftur við at spæla, segði Annika Højgaard, ið ikki sá út til at finna røttu orðini.

## Eldhuga og smittandi medferð

Orkestrið ælabogin fyllir tíggju ár í ár, og Annika hevur verið leiðari av orkestrinum líka síðani tað byrjaði, so tað var ikki óuppiborið, at hon fekk ársins herða klapp í ár.

- Annika hevur við síni lítilætnu medferð og smittandi eldhuga givið starvsfeløgunum íblástur og eggjan. Hon hevur við nærlagni, umsorgan og virðing vant tónleik fólkið við menningartarnið, bæði í ælaboganum og í øðrum høpi, og givið teimum lívsgleði og sjálvirðing, grundgevur Anna Háberg, ið handaði Anniku Højgaard herðaklappið hjá Javna.



*Jákup Hansen tók eisini orðið, og ynskti Anniku og ælaboganum til lukku*



*Annika Højgaard visti ikki, hvat hon skuldi siga, tá hon hevði móttikið herðaklappið*

## Ælabogin tíggju ár

Jákup Hansen, ið er ein av limunum í ælaboganum, segði eisini nøkur orð. Hann ynskti bæði ælaboganum og dirigentinum til lukku.

Sigrun Wardum er í stuðulsnevndini hjá ælaboganum. Hon var á ongan hátt bilsin av, at Annika fekk herðaklappið

- Um Annika ikki var, so var ælabogin ikki her, greiddi Sigrun Wardum frá.

Alt í Alt, ein stuttlig løta, har ælabogin spældi góðar sangir, og helt føðingardag á bestan hátt.

**Demich P/F Tórshavn**
Postboks 378 - Stiðjagøta 2
FO-110 Tórshavn
Telefon +298 309 310
demich@demich.fo

**Demich P/F Vágur**
Á Marknoyri
FO-900 Vágur
Telefon +298 37 35 35
demich@demich.fo

**Demich P/F Runavík**
Heiðavegur 80
FO-610 Saltangará
Telefon +298 445500
demich@demich.fo

VØLUND VARMETEKNIK



HITI • VENTILATIÓN • SANITET

Vit hava røttu loysnina til júst tín tørv.

Umhvørvisvinarlig orka við hitapumpu frá Demich

demich